Eysturíkskur frímerkjasavnari:

Føroyskt frímerki tað vakrasta

Í einum savni, sum telur 50 frímerkjaalbum, sigur eysturríkarin, Rudolf Baeck, at frímerkið hann eigur av einum føroyskum veðrahøvdi, er tað vakrasta, hann eigur. Hann og kona hansara hava júst vitjað í Føroyum

ÍTRIV
Ingrid Bjarnastein

Rudolf Baeck er 77 ára gamal, og hann hevur savnað frímerkir síðani 1952. Hann skrivar saman við øðrum frímerkjasavnarum og býtir um frímerkir við teir. Og var tað soleiðis, hann fekk fatur á fyrsta føroyska frímerkinum.

– Eg skrivi saman við einum dana, og var tað hann, ið sendi mær fyrsta føroyska frímerkið í mínum savni. Hetta frímerkið var av einum føroyskum veðrahøvdi, og dámar mær tað so væl, at í dag sigi eg, at hetta er tað vakrasta frímerkið í mínum savni, sigur Rudolf Baeck.

Áhugin fyri føroyskum frímerkjum vaks støðugt, og síðani 1976 hevur hann lagt tey føroysku frímerkini afturat savni sínum.

– Eg varð so fasineraður av føroyska frímerkinum, og nú fái eg allar frímerkjaútgávurnar, sum Postverk Føroya gevur út.

Hvørt ár á jólum sendir ein kvinna, ið arbeiðir á Postverkinum Rudolf og konu hansara eina jólaheilsan. Rudolf sigur, at hann hevur bæði ferðast í Grønlandi og Íslandi fyrr, men hesuferð gjørdu hann og kona hansara av, at tey skuldu koma til Føroya at hitta fólkini, ið senda frímerkini niður til Eysturíki.

Rudolf Baeck, ein frímerkjasavnari úr Eysturíki, og kona hansara, Johanna. Tey hava vitjað í Føroyum fyri at siggja fólkini og náttúruna, ið goymir seg aftanfyri føroysku frímerkini
Mynd: Álvur Haraldsen

Hugtikin

Í frímerkjaútgávunum, sum Postverkið gevur út, er tekstur at lesa, og soleiðis hevur Rudolf Baeck lært eina rúgvu um Føroyar, tess mentan, søgu, menniskju og náttúru.

– Eg fái nógv burturúr teimum føroysku frímerkjaútgávunum, og eri eg ógvuliga hugtikin av teimum. Føroysku frímerkini eru listarliga rík, og sniðið er gott, bæði útsjóndin og litirnir, greiðir eysturríkski frímerkjasavnarin frá.

Um Føroyar siga Rudolf og konan, Johanna, at tað er eitt undurfult land. Vakurt við vinarligum fólkum og góðum mati. Meðan tey hava verið í Føroyum hava tey verið kring oyggjarnar og eisini ein túrur við Norðlýsinum stóð á longu ferðaskránni.

– Í frímerkjasavninum hjá mær eru 50 album, sum eg havi savnað seinastu 50 árini. Eg veit ikki, hvussu nógv tað er vert, men tað er líkamikið fyri meg. Tað er vinarlagið tú fært við onnur fólk úr øllum Evropa, sum telur, og á henda hátt fært tú nakað heilt annað burturúr enn eitt peningavirði, sigur Rudolf Baeck.

Rudolf og Johanna eru longu farin aftur til Eysturíkis, og sigur hann, at hann fer at halda áfram at savna frímerkir – eisini tey føroysku.

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Signar í Homrum, Svoríki, sihep@algonet.se
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

VM í fótbólti

Í hesum døgum fer ein av heimsins størstu ítróttarhendingum fram. Tað er sjálvandi heimsmeistaraskapið í fótbólti, eg sipi til. Alla staðni verður gjørt greitt, at hetta er størsta hendingin í ítróttarheiminum, og allar sjónvarpskanalir, útvarpskanalir og miðlar annars hava nakað av síni senditíð, í meira ella minni mun, setta av til fótbóltin. Og fyri meg, sum annars ikki eri áhugaður í ítrótti av nøkrum slag, (tað skuldi kanska verið beachvolley fyri kvinnur, í so fall), so sleppi ikki heldur eg undan fótbóltsfeprinum.

Svoríki er við í VM, og uttan at ætla tað, so havi eg hugt eftir dystinum millum Svoríki — England (1-1) og Svoríki — Nigeria (2-1). Og eg sum bara kenni ymsar leikarar frá lýsingum, byrji nú knappliga at sita framman fyri skíggjanum og rópa á Henke at skjóta, og loysi nakrar eiðir yvir Ljungberg, tá hann heldur bóltinum ov leingi. Og í skrivandi løtu, bíði eg spentur eftir dystinum mikudagin, tá Svoríki skal møta Argentina. Ein buddistiskur prestur, ella hvat teirra trúðarleiðarar kallast, var við í tíðindunum í kvøld, og hann segði seg verða sannfordan um, at Svoríki fór at vinna. Og so bað hann eina bøn fyri "Du gamla å fria...", ræddi burtur nakrar óndar andar, og vissaði stoltur tíðindamannin um, at hann koyrdi Volvo.

Men lukkutíð eri eg ikki einsamallur um at verða tikin av ræði av hesu so almáttugu hending. Flest øll fylgja við í VM, í minni og størri mun. Tað eru tey, har tað er nokk at fara inn á tekstvarpið um kvøldið, og síggja, hvussu dagurin hevur gingið, hvør hevur vunnið og hvør hevur tapt. Og so til tey sum avnokta familju og annað týdningarleyst undir dystunum, prátinum, viðmerkingunum, endursendingnunum, tabellunum, kjakinum og so viðari.

Og vikubløðini fyri kvinnur eru eisini við í hesum heimsumfevnandi rúsi. Tey geva øll góð ráð, um hvussu tú bjargar hjúnarbandinum undan fótbólts-VM. Burtur eru allar forsíðurnar um, hvussu búkurin verður slættur, ella hvussu rukkurnar skulu burtur. Í staðin verður lagt lag á, hvussu tú bjargar hjúnabandinum undan VM, og greitt verður frá í besta Desmond Morris stíli, hvussu umráðandi tað er hjá monnunum at sleppa at leika við í hesum fornaldarliga veiðiliði. At menn so at siga fáa styrkt um sín manndóm, at teir kenna seg heima í flokkinum.. Og rætt skal verða rætt, tað er jú í flestu førum menn, sum gerast rúnarbundnir av hesari stórhending.

Og í góðveðrinum sleppur urtagarður at vera urtagarður, eingin plena verður sligin, og vil familjan út á strondina, fáa tey lykilin til bilin. Onki kemur í vegin fyri dystirnar.

Og tað er eisini nakað sum fyritøkurnar hava lært. Hóttan um uppsøgnir bíta ikki á. Og stjórarnir kunnu skelda alt tað teir vilja, men teir vilja eisini síggja dystirnar. Tað vil siga, teir mannligu í hvussu so er. Seinast tá VM var, øktist sjúkrafráverðan hjá monnum millum 20 og 44 ár, 3,6% ta tíðina leikirnir vardu. Og ikki so fá fáa sær frí eina viku ella tvær. So nógvar fyritøkur hava bundið um heilan fingur, og í staðin sett upp sjónvarpstól í kaffistovurnar, har arbeiðsfólkið kann hyggja eftir svensku dystunum. Teir geva heldur 2 ferðir 45 minuttir plus eitt korter, og fáa fólkið til arbeiðis, enn at fáa fleiri sjúkrafráboðanir, sum liggja undarliga nágreiniliga á teimum døgunum, tá teir stóru dystirnir verða spældir.

Men hóast alt, so skal lívið jú ikki bara verða arbeiði. Annað hvørt ár ella fjórða, eg veit ikki hvussu ofta hetta er, mugu vit kunna setast aftur á og taka okkum av løttum og bert njóta, hvussu væl vit hava lært at sparka eina luftfylta húð. Tað byrjaði vist nokk umleið 300 ár áðrenn Krist, men heilt vist hava vit lært nógv síðani tá.

Og eg sendi nakrar tankar til mínar starvsfelagar, sum stríðast við hitan inni á stórmarknaðinum, har eg arbeiði. Eg var so heppin at fáa eina dóttir stutt síðani, so eg havi pápafrí í tvær vikur...Heja Sverige

Leygardagin 15/6 hava vit opið frá kl. 11.00 til 17.00

Í hesum sambandið hava vit nógv góð brúktbilatilboð m.a. hesi:

Upp til 20.000 kr. í avsláttri

Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar

Citroen Jumper Ch. v/last km. 120.000, árg. aug. 1998 v/ mvg **130.000,-**	**Citroen Saxo 1,5D 3h** km. 25.000, árg. jan. 2001 **86.000,-**	**Mazda Demio 1,3 5h** km. 50.000, árg. feb. 1999 **99.000,-**
Citroen Xsara 1,6i 5h km. 30.000, árg. feb. 1998 **107.000,-**	**Mitsubishi Galant 2,0** km. 150.000, árg. juni 1992 **37.000,-**	**Nissan Terrano 2,7TDi** km. 71.000, árg. nov. 1997 **133.000,-**
Citroen Xsara 2,0 HDi 5H km. 90.000, árg. nov. 1999 **145.000,-**	**Mitsubishi L300 2,5D** km. 161.000, árg. juni 1994 v/ mvg **70.000,-**	**Hyundai Accent 1,3 LS 5H** km. 65.000, árg. feb. 1999 **75.000,-**
Citroen Xantia 1,9TD 5H km. 60.000, árg. feb. 1998 **118.000,-**	**Mitsubishi Pajero 2,8TDi** km. 40.000, árg. sept. 1998 v/ mvg **179.000,-**	**Kia Sportage 4x4 2,0TD** km. 49.000, árg. aug. 1997 **87.000,-**
Citroen ZX 1,9D stc. km. 89.000, árg. mars 1996 **86.000,-**	**Seat Cordoba 1,9SDi STC. 5h** km. 35.500, árg. aug. 1999 **115.000,-**	**Citroen Xantia 1,8i 16V 5h** km. 63.000, árg. mars 1996 **112.000,-**

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurn - 3118920

Meiaristlærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til meiarist at byrja 1.juli 2002.

Lærutíðin er 3 ár og 4 mánaðir, og verður skúlagongd í Danmark 3 ferðir í lærutíðini. Umsóknirnar skulu verða okkum í hendi **áðrenn mánadagin 24.06.2002.**

Umsóknirnar verða at senda til:

Búnaðardepilin
FO-410 Kollafjørður
Merkt: Umsókn

Lærari/Vikarur

Søkt verður eftir lærara/vikari til Mikladals skúla í tíðaravmarkað fulltíðarstarv skúlaárið 2002/2003.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi tann 29. juni.

Lærarahús í góðum standi eru í bygdini.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Hús til sølu

Hús í Perskonugøtu 12 til sølu um hóskandi boð fæst.

72 m² í tveimum hæddum, báðar innrættaðar. Húsini eru klár at flyta inn í.

Tlf. 211208

Kappsigling

verður á Eystanstevnu í Runavík sunnudagin 16/6. Bátarnir møta við Lynfrost kl. 13.

Tilmelding:
Frímundur 441380
Charles 225388
Regin 253937

Áhugafelagið Seglið

Til sølu

Iveco Daily
50 C 13
nýsýnaður
(Krevur stórt koyrikort).
Árg.: 11/2000
Km 110.000

Daihatsu
Rocky SE
Jeepur
Árg. 09/1996
Km 137.500

Føroya Betongsaging
Tlf. 217543
Teldupostur: fobetsag@post.olivant.fo

Maður søkist

Álítandi maður søkist at dríva ein 20 tons stóran útróðrarbát við allari nautiskari útgerð og 8 el. vágasnellum, 90 stampum, egningartrakt og gágguknúsara. Øll útgerð er nýggj inkl. motorurin. Báturin er heimahoyrandi í Eysturoynni.

Skriva til:
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
Bill. mrk. 15.06.